# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 16.02.2022
Mál nr.: 21/22263
Málsviðgjørt: JEK
Ummælisfreist: 07.02.2022
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)**
(Tiltrongdar nágreiningar, broytingar og dagføringar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldsógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 3 verður litra f) orðað soleiðis:
“f. Fólkaflutningur. Frítøkan fevnir ikki um annan vinnuligan fólkaflutning við bussi enn rutuflutning. Umframt fólkaflutning fevnir ásetingin eisini um flutning av akførum við skipum hjá strandferðsluni innanoyggja.”

**2.** Í § 2, stk. 3 verður litra n) orðað soleiðis:
“n) Ferðaleiðarar, ferðamannaskrivstovuvirksemi og ferðamanna leiðbeiningar- og upplýsingarvirksemi.”

**3.** Í § 3, stk. 2 verður “Í samráð við Føroya Kærustovn, avger landsstýrið” broytt til: “Landsstýrismaðurin avger”.

**4.** Í 5, stk. 1, § 18, stk. 3, § 18, stk. 7, § 30, stk. 1, § 30, stk. 2, § 30, stk. 3, § 31, stk. 1, § 31, stk. 2, § 38, stk. 1, § 40, stk. 4 verður “Toll- og Skattstovu Føroya” broytt til: “TAKS”.

**5.** Í § 21, stk. 2, § 21, stk. 3 tvær staðni, § 23, stk. 1 tvær staðni, § 23a, stk. , nr. 3, § 23a, stk. 3, § 23a, stk. 4, § 24, stk. 2, § 28, stk. 5, § 29, stk. 1, § 29, stk. 2, § 29, stk. 3 tvær staðni, § 30, stk. 4, § 32, stk. 2, § 34, stk. 1, § 38, stk. 1 verður “Toll- og Skattstova Føroya” broytt til: “TAKS”.

**6.** Í § 27, stk. 7 verður “Í samráð við Føroya Kærustovn, kann landsstýrið” broytt til: “Landsstýrismaðurin kann”.

**7.** Í § 38, stk. 1 verður “limum í skatta- og avgjaldskærunevndini,” broytt til: “Føroya Kærustovni”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. § 1, nr. 1 kemur tó ikki í gildi fyrr enn 1. oktober 2023.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum verða tiltrongdar nágreiningar, broytingar og dagføringar gjørdar í meirvirðisgjaldslógini.

Ásetingin um fólkaflutning í meirvirðisgjaldslógini hevur í fleiri ár volt trupulleikar bæði fyri umsitingina og fyri vinnuna.

Fleiri orsakir eru til hetta, men í stóran mun er hetta grundað á, at tað hevur verið ivasamt, hvussu hugtakið fólkaflutningur skal skiljast. Er tað til dømis fólkaflutningur í meirvirðisgjaldshøpi at fara við ferðafólki at njóta føroysku bjørgini? Ella at fara ein stimitúr við einum skjóttgangandi báti í einum av okkara mongu sundum ella firðum?

Dømini eru nógv og onnur kundi tí verið vald.

Eitt annað økið sum hevur verið ein avbjóðing fyri umsitingina og vinnuna er tænastan heildarveiting.

Innan fyri ferðavinnuna er tað ikki óvanligt at bjóða ferðafólki okkurt til matna afturat sjálvum flutninginum. Spurningurin er tá, hvat er at skilja sum avgjaldsfríur flutningur. Er tað heildarveitingin ella er tað bara sjálvur flutningurin?

Fyri ikki at enda í somu støðu sum áður, eru høvuðshugtøkini í uppskotinum t´´i allýst.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi áseting um fólkaflutning hevur verið trupul at umsita.

§ 2, stk. 3, litra f) í meirvirðisgjaldslógini ásetir, hvør fólkaflutningur er avgjaldsfríur.

§ 2, stk. 3 litra n í meirvirðisgjaldslógini frítekur Ferðamannastovuvirksemi og ferðamanna leiðbeiningar- og upplýsingarvirksemi frá avgjaldsskylduni. Hóast ásetingin ikki umrøður virksemi sum ferðaleiðari, hevur TAKS til og við 31. desember 2021 við heimild í hesi áseting frítikið virksemi um ferðaleiðari frá avgjaldsskylduni.

§ 3, stk. 2 í meirvirðisgjaldslógini ásetir, at landsstýrið í samráð við Føroya Kærustovn avger, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald.

Í eini røð av ásetingum í meirvirðisgjaldslógini verða heitini “Toll- og Skattstovu Føroya” og “Toll- og Skattstova Føroya” brúkt, hóast stovnurin hevur havt navnið “TAKS” síðstu árini.

§ 27, stk. 7 í meirvirðisgjaldslógini ásetir, at landsstýrið í samráð við Føroya Kærustovn kann loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í § 27, stk. 3-6 í meirvirðisgjaldsógini.

Loksins ásetir § 38, stk. 1 í meirvirðisgjaldslógini, at tagnarskyldan í meirviðisgjaldslógini eisini fevnir um limirnar í skatta- og avgjaldskærunevndini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at gera tiltrongdar nágreiningar, broytingar og dagføringar í meirvirðisgjaldslógini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verða broytingar og dagføringar gjørdar í meirvirðisgjaldslógini.

Við broytingini í § 1, nr. 1 verður nágreinað, hvør fólkaflutningur er avgjaldsfríur, eins og tað við broytingini í § 1, nr. 2 verður staðfest, at virksemi sum ferðaleiðari er avgjaldsfrítt, og er hetta ein lógarfesting av tí venju, TAKS hevði fram til ársskiftið.

Við broytingini í § 1, nr. 3 verður tað staðfest, at tað er landsstýrismaðurin, sum avger, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald sambært meirvirðisgjaldslógini. Hetta verður gjørt við kunngerð. Kunngerðir, sum gera munandi broytingar í galdandi reglum, verða vanliga sendar øllum viðkomandi pørtum til hoyringar.

Við broytingunum í § 1, nr. 4 og 5 verða heitini “Toll- og Skattstovu Føroya” og “Toll- og Skattstova Føroya” broytt til: “TAKS”, sum er navnið stovnurin hevur havt síðstu árini.

Í § 1, nr. 6 verður staðfest, at tað er landsstýrismaðurin, sum undir heilt serligum umstøðum kann loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í § 27, stk. 3-6 í meirvirðisgjaldslógini.

Loksins verður § 38, stk. 1 dagførd við § 1, nr. 7, og er hetta grundað á, at heimildirnar hjá skatta- og avgjaldskærunevndini við løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 eru fluttar til Føroya Kærustovn.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið verður til undanhoyring hjá Vinnuhúsinum og TAKS .

Somuleiðis hevur fundur verið millum Vinnuhúsið, TAKS og Fíggjaramálaráðið.

Hóast skotbráið er stutt, er ætlanin kortini at senda uppskotið til almennna hoyring, men við stuttari hoyringsfreist.

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið, og er hetta grundað á, at uppskotið í stóran mun er ein lógarafesting av verandi venja.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS og er hetta grundað á, at tað við uppskotinum gerst greiðari, hvør fólkaflutningur er meirvirðisgjaldsfrítikin.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður, at uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri stóran part av ferðavinnuna, við tað viðurskiftini við uppskotinum gerast greiðari.

Fyri bussvinnuna hevur uppskotið tó neiligar fíggjarligar avleiðingar, tá talan er um er aðra bussvinnu enn rutuflutning.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingarnar á umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á skyldu Føroya at fylgja millumtjóða sáttmáttmálum á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki í ósamsvar við:

1) **Hoyvíkssáttmálin**

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Við uppskotinum verða verandi avgjaldsfrítøkur nágreinaðar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur avgjaldsskyldur á flutningsvirksemi við bussi, tá endamálið er at veita fólki upplivingar heldur enn flutning.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
**Nr. 1**
Við uppskotinum verður mælt til, at ásetingin verður nágreinað, soleiðis at tað neyvari verður ásett, hvat tað er fyri fólkaflutningur, sum verður hildin uttan fyri avgjaldsskylduna.

Ásetingin fevnir um allan fólkaflutning uttan mun til, um hann fer fram á landi, sjógvi ella loftvegis.

Við atliti at bussum fevnir ásetingin einans um vinnuligan rutuflutning.

Nýtsla og útleigan av bussum til annan ferðafólkaflutning og aðrar tænastur í hesum sambandi eru sostatt ikki fevndar av avgjaldsfrítøkuni

Umframt fólkaflutning fevnir ásetingin eisini um flutning av akførum við skipum hjá strandferðsluni innanoyggja.

Nøkur hugtøk:

- Fólkaflutningur er at skilja sum flutningur av ferðafólki við akfari av einum og hvørjum slag á landi, sjógvi ella loftvegis. Um ein møguligur túrur fevnir um annað enn fólkaflutning, er tað ikki heildarveitingin, sum er avgjaldsfrí, men bert fólkaflutningurin.
- Rutuflutningur er at skilja sum flutningur av ferðafólki úr einum stað í annað stað.
- Bussur er eftir hesi uppskoti at skilja sum akfar, sum hevur minsta lagi 9 sitipláss umframt føraran.

**Nr. 2**
Talan er um eina lógarfesting av tí venju TAKS hevði fram til 1. januar 2022.

TAKS herdi sína venju 1. januar 2022. Herðingin hevði við sær, at ferðaleiðarar frá hesum degi at rokni blivu avgjaldsskyldugir.

Við uppskotinum verður vent aftur til ta skipan, sum var galdandi áðrenn 1. januar 2022.

**Nr. 3**
Við broytingini verður staðfest, at tað er landsstýrismaðurin, sum avger, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald sambært hesi lóg av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.

**Nr. 4 og 5**
Við ásetingunum verður “Toll- og Skattstovu Føroya” og “Toll- og Skattstova Føroya” broytt til TAKS, sum er navnið sum stovnurin hevur havt seinastu árini.

Talan er sostatt um eina dagføring av navninum.

**Nr. 6**
Við ásetingini verður staðfest, at tað er landsstýrismaðurin, sum undir heilt serligum umstøðum loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í § 27, stk. 3-6 í meirvirðisgjaldsógini.

**Nr. 7**
Við ásetingini verður § 38, stk. 1 í meirvirðisgjaldslógini dagførd, og er hetta grundað á, at heimildirnar hjá s
skatta- og avgjaldslógini við løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 eru fluttar til Føroya Kærustovn.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 16. februar 2022

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur